Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Stuðulsskipan og markamót

Spurningar:

1. Hvussu nógvir borgarar hava mist stuðulin frá Almannaverkinum seinasta árið orsakað av, at tey eru vorðin 67 ár?
2. Hvussu nógvir borgarar, 67 ár og eldri, fáa stuðul frá Almannaverkinum?
3. Er ein ávís mannagongd fyri, nær stuðulin ikki verður veittur, eftir ein er vorðin 67 ár, og verður ein ítøkilig meting gjørd og kunnað fyri borgaranum ?
4. Er tað møguligt hjá kommununum at gera avtalu við Almannaverkið um framhaldandi stuðulstænastu til borgarar yvir 67 ár móti gjaldi?

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum til uppskot um broyting í lóg um eldrarøkt og heimatænastu v.m. (tingmál nr. 081/2019) verður sagt, at kommunurnar hava ábyrgd av heimatænastuni, meðan landið hevur ábyrgdina av stuðulstænastuni.

Heimatænastan er ikki aldurstreytað og fevnir um heimahjálp og sjúkrarøkt. Stuðulstænastan er stovnsett at stuðla borgarum millum 18 og 66 ár, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so hesi hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.

Í almennu viðmerkingunum verður víðari sagt: «Stuðulin kann halda áfram, eftir at borgarin er vorðin 67 ár, um viðkomandi framvegis fær gagn av stuðlinum og hevur møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív.»

Í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur § 5 stk. 2 verður ásett: «Hóast ásetingina í stk. 1 kann persónur í fólkapensjónsaldri, ið er fevndur av løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., framhaldandi fáa tænastu sambært hesi løgtingslóg, um endamálið við tænastuni framhaldandi verður rokkið.»

Tað ljóðar, at borgarar uppliva, at tá ið tey fylla 67 ár, so heldur tænastan uppat, uttan at borgarin hevur fingið eina meting av, um hann framhaldandi kann fáa gagn av stuðlinum og harvið møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív, ið hann hevði møguleika til, meðan hann hevði stuðulin.

Borgarin stendur sostatt uttan stuðul og hevur bert møguleika at fáa eina sera avmarkaða heimahjálp, ið ikki hevur sama endamál sum stuðulin, ið viðkomandi fekk, áðrenn hann var fyltur 67 ár.

Fyri at fáa svarað, hvussu ásetingin í lógini um almannatrygd og tænastur og viðmerkingarnar í lógini um heimatænsatu, eldrarøkt v.m. verða útintar í praksis, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 15. juni 2021

Eyðgunn Samuelsen